# Okkara lega

Heimamissiónin bjóðar rørslu- og menningartarnaðum o.ø., saman við avvarandi á legu í Nesvík.

**Kostnaður:**

| | |
|---|---|
| Vaksin: | 275,- |
| Børn 5-14 ár: | 150,- |
| Børn 0-4 ár: | Ókeypis |

Kann flytast á konto okkara í Føroya Sparikassa 9181-447.414.9. Havið kvittan við.

Seinasta freist at tekna seg er 10. september.
Send seðilin til:

Kirkjuligu Heimamissiónina
FO-437 Nesvík

Eisini kann ringjast til:
Nesvíkar á tlf. 470000, Karen á tlf. 448335
ella til Marjun á tlf. 447147

*Lega 1 er frá 16. - 18. sept.*
*Lega 2 er frá 23. - 25. sept.*




# Telduarbeiði til lesandi

Á Havlívfrøðiligu royndarstøðini í Kaldbak hava vit brúk fyri einum lesandi á telduøkinum til eitt avmarkað arbeiði í summarfríðtíðini.

Talan er um at gera og laga til brúkaraflatur í databasuforritinum MS Access og arbeiði við heimasíðugerð. Annað fyrifallandi telduarbeiði kann eisini koma uppá tal.

Um tú hevur royndir innan hesi øki, set teg tá í samband við okkum.

Løn sambært avtalu.

**Havlívfrøðiliga royndarstøðin**
FO-180 Kaldbak
Tlf. 356111
Teldupostur: Mailto@havbotnur.fo

# Lærarastarv/-vikarur

Sandoyar Meginskúli søkir við hesum eftir einum lærara til tíðaravmarkað starv í skúlaárinum 2005/2006 vegna avlopstímar.

Starvið verður lønt smbrt. avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið í lønarflokkunum 18.1 - 27.4.

Møguligar umsóknir skulu vera skúlastýrinum í hendi í seinasta lagi tann 27. juni 2005.

**Skúlastýrið fyri Sandoyar Meginskúla**
v/ Maiken Krabenhøft
240 Skopun

**Landssjúkrahúsið**

# Ljósmóðir

Á Ljósmøðraskipanini á Landssjúkrahúsinum er eitt fulltíðar starv sum ljósmóðir leyst til setan 1. august 2005.

**Løn- og setanarviðurskifti** smb. sáttmálan millum Fíggjarmálaráðið og Ljósmøðrafelag Føroya.

**Førleikakrøv:**
- prógv og góðkenning sum ljósmóðir
- starvsroyndir innan viðgongu-, føðing og barsilstíð
- fleksibul og positiv
- hug til tvørfakligt samstarv

**Meira fæst at vita** um starvið við at venda sær til Ruth Vang, ljósmøðrafakligur leiðari, telefon 304500, lokal 5303 ella við at skriva til e-post ruva@lsh.fo

**Umsóknarfreistin** er 22. juli 2005 kl. 12.00.

**Skrivlig umsókn** merkt "umsókn til starv" við avrit av prógvum, autorisatión, CV, viðmælum o.t. skulu sendast til

**Landssjúkrahúsið**
Lønar- og starvsfólkadeildin
FO 100 Tórshavn

*Á heimasíðuni hjá Landssjúkrahúsinum www.lsh.fo sæst meira um størv við at klikka á leinkjuna »starvsfólk«*



**Ellis- & avlamis-heimið í Vágum**

## Søkir eftir

**Sjúkrarøktarfrøðingi** til fast starv uppá 0.5 tíð at byrja 1. oktober 2005. Arbeitt verður í skiftandi vaktum, tó í løtuni mest kvøldvakt.

**Ergoterapeuti** til avloysarastarv uppá 0.8 tíð vegna barnsburð at byrja umleið 1. sept. og 28 vikur fram.

**Heilsuatstøðingi ella heilsuhjálpara** til avloysarastarv uppá 0.5 tíð vegna barnsburð at byrja skjótast tilber og 28 vikur fram.
Arbeitt verður í skiftandi vaktum.

Dentur verður lagdur á, at umsøkjarin hevur førleika, hug og hegni at veita brúkaranum eina góða tænastu við teimum møguleikum sum dagsins eldrapolitikkur gevur rúm fyri.
Góð samstarvsevni hava stóran týdning.

Løn verður eftir avvarðandi sáttmála, sum einstaka felagið hevur við fíggjarmálaráðið.

Umsókn við neyðugum prógvum v.m. verður at senda til heimið áðrenn 5. juli 2005.

Áhugaðir umsøkjarar eru vælkomnir at venda sær til leiðaran á tlf. 332600 fyri at fáa meira at vita.

-so eru tit við!

# Norðskála-Oyrar skúli

**Hesi tíðaravmarkaðu størv eru leys at søkja:**
1 lærarastarv fyri lærara í farloyvi
1 lærarastarv við niðursettum tímatali 13 t/v at undirvísa børnum við serligum tørvi
1 lærarastarv við niðursettum tímatali 10 t/v vegna avlopstímar

Størvini, ið eru tíðaravmarkað skúlaárið 2005/06, verða lønt sambært sáttmála millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið.

1 starv fyri lærara í barnsburðarfarloyvi frá 15. august til 23. september.

Starvið, ið eru tíðaravmarkað, verður lønt sambært sáttmála millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið.

1 starv sum stuðul 20 t/v at byrja 1. august

Starvið, ið eru tíðaravmarkað, verður lønt sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Fíggjarmálaráðið.

Nærri fæst at vita um størvini frá 1. læraranum á tlf: 422245 ella 212245.

Umsóknir skulu verða skúlastýrinum í hendi í seinasta lagi 26. juni kl. 10.

Leggið ljósrit av prógvi og møguligum viðmælum.

**Skúlastýrið fyri Norðskála-Oyrar skúla**
Dávid R. Hansen
FO-450 Oyri

**Sjóbjargingarstøðin MRCC-Tórshavn**
Tlf: +298 351300 • Fax: +298 351301
Telex: 81200 TLGR FA
Inmarsat C: 423 116210 • Inmarsat B: 323 116220 (voice)
323 116221 (Fax)

# Fráboðan um seismikkvirksemi

Lýst verður, at seismiskar kanningar verða gjørdar á hesari havleið.

| | |
|---|---|
| Útnyrðingshornið | 60º30' N 008º30' W |
| Landnyrðingshornið | 60º30' N 007º00' W |
| Landsynningshornið | 60º00' N 007º00' W |
| Útsynningshornið | 60º00' N 008º30' W |

Felagið Fugro kannar økið.
Kanningarnar verða gjørdar vegna Føroya Kolvetni.

| | |
|---|---|
| Byrjað verður umleið | 21-06-2005 |
| Arbeiðið tekur væntandi | 3 dagar |
| Skipanavn | Polar Princess |
| Kallibókstavir/Flagg | JXBV3/Norskt |
| Fiskiveiðiumboð | Magni Skaale |

Samband fæst við skipið á VHF rás 16.

Upplýsingar um kanningararbeiði fáast frá Tórshavn Radio, á telefon 351300, ella á telefax 351301.

Eisini verður víst til heimasíðuna www.mrcc.fo.